# Peugeot 4007 og Subaru Impresa

**Í sendingini Bylgjan hjá Kringvarpinum hesa vikuna vórðu tveir bilar ummældir: Peugeot 4007 og Subaru Impresa WRX, sum báðir hava tað til felags, at teir eru gjørdir í Japan**

BILAR

Bilarnir sum vórðu ummældir í sendingini Bylgjan hjá Kringvarpinum mikudagin 9. januar vóru Peugeot 4007 við 2.2 DI-D dieselmotori við 156 hk, og Subaru Impresa WRX AWD Sport við 2,5 litra boksaramotori (bensin) við 230 hk.

## Peugeot 4007

Peugeot 4007 er ein sonevndur SUV (Sport Utility Vehicle), sum er ein arbeiðsligur bilur við liðiligari og praktiskari innrætting t.d. er baklúkan tvídeild, soleiðis at lessihæddin er sera lág og baksetrini kunnu ómakasleyst leggjast elektroniskt niður.

Bilurin er væl egnaður sum bæði famliju- og arbeiðsbilur.

2.2 DI-D dieselmotorurin við 165 hk passar við sínum snúningsmomenti upp á 380 Nm, væl til bilin, soleiðis at hann er kvikur, orkar væl og hevur yvirskot av kraft.

Hóast Peugeot 4007 er ein 4x4, ber til við einum knøtti at stilla um til at drívmegin einans er á forhjólunum. Bilurin hevur 7 sitipláss.

Bilurin sum varð royndarkoyrdur var ein luksusútgáva við t.d. leðursetrum el-stilling av førarasetri og bakkikamera. Hesin kostar kr. 479.000. Peugeot 4007 kann síggjast og roynast hjá Auto Service. Prísirnir byrja við kr. 399.000.

## Subaru Impresa WRX

Annar bilurin sum varð royndarkoyrdur var nýggjasta útgávan av Subaru Impreza í WRX AWD Sport útgávuni við 2,5 litra motori við 230 hk. Talan er eum ein rúmligan hatchback við góðum plássi til fimm ferðandi.

Hóast Subaru Impreza WRX AWD Sport sær út sum einhvør annar hatchback, er í veruleikanum talan um ein ektaðan sportbil í vanligum innpakningi.

Bilurin er uppbygdur sum sportbilur við sermerktum koyrieginleikum. Boxermotorurin liggur lágt í motorrúminum, fyri at geva bilinum tryggar og fastar koyrieginleikar. Hann er annars útgjørdur við t.d. VDC (Vehicles Dynamics Control System) og ESP við on/off traction.

Eisini í kabinuni er bilurin sportligur við flottum designi, nógvari útgerð og setrum sum stuðla sera væl undir koyring.

Bilurin, sum varð royndarkoyrdur, kostar kr. 418.000 kr, men Subaru Impreza fæst eisini í biligari útgávum við 1,5 og 2,0 motori. Prísirnir byrja við kr. 248.000 fyri ein Impreza 1,5 R AWD. Subaru Impresa WRX AWD Sport kann síggjast og roynast hjá Berg Motors.

Fróði Løksagarð stóð fyri sendingini, og bilaummælarar vóru Óla Jákup Rólantsson frá Vikublaðnum, Sofus Hansen, bilbyggjari, og Magnus Gunnarsson frá Sosialinum.

**mg**





*Peugeot 4007 við 2.2 DI-D dieselmotori við 156 hk. Hesin bilurin er ein luksusútgáva við t.d. leðursetrum el-stilling av førarasetri og bakkikamera*





*Subaru Impresa WRX AWD Sport við 2,5 litra boksaramotori við 230 hk er ein ektaður sportbilur í vanligum innpakningi*


## Nissan Navara til sølu



Nissan Navara SE 2,5 dCi Double Cab (171 hk) 5-persóna bilur við last (skrásettur sum persónbilur). Eitt ára gamal. Skrásettur fyrstu ferð 30. januar 2007. Koyrt 19.500 km.
Bilurin er væl hildin og sera væl útgjørdur og hevur t.d. differentialesperru, krók aftan, krom el-síðuspegl, gáttir og er væl rustviðgjørdur.
Nýprísur kr. 442.000,-
**Til sølu við stórum avslættri.**

**Tel. 212036**


# Nýggjur Focus RS í 2009



*Nýggjur Ford Focus RS kemur á marknaðin í 2009*

Ford í Evropa hava nú kunngjørt, at ein heilt nýggjur Focus RS kemur á marknaðin í 2009.

Saman við tíðindaskrivinum frá Ford er ein mynd av nýggja Focus RS, sum sýnir hvussu vit kunnu vænta, at bilurin kemur at taka seg út frammanífrá .

Bilurin verður bygdur yvir nýggja Focus ST og skal framleiðast av Ford Team RS.